Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jóannes Hansen 50



Í dag, fríggjadagin 19. august, fyllir Jóannes Hansen á Toftum 50 ár.

Jóannes er ættaður úr Klaksvík, sonur Ragnhild og Karsten Hansen. Foreldrini vóru bæði ættað úr Svínoy og búsettust á Gerðareiði í Klaksvík. Tey eiga børnini Hanus, Jóannes og Finngerð.

Í 1972 tók Jóannes realprógv við Klaksvíkar Skúla og studentsprógv úr Hoydølum í 1975. Síðani virkaði hann eitt ár sum læraravikarur við Klaksvíkar Skúla. Í 1976 fór Jóannes á læraraskúla í Havn, men flutti í 1978 til Danmarkar, har hann fullførdi læraraútbúgvingina á Emdrupborg Seminarium í 1980.

Árini 1980-84 starvaði Jóannes sum lærari við Jakobsskolen í Keypmannahavn, men síðani fór hann at lesa samfelagsfrøði og landafrøði á RUC, har hann tók prógv í 1987. Síðani gekk leiðin aftur til Føroya, har hann fekk starv á Studentaskúlanum í Eysturoynni og starvast framvegis.

Í 1975 flutti familjan til Onglands at búgva eitt ár. Lestrarárið 1995-96 las Jóannes Political Science á Oxford Brookes University.

Vit sum vuksu upp saman við Jóannes minnast, at hann gjørdi skjótt vart við síni sjónarmið, og hann dugdi at føra bæði munn og penn. Í mong ár góvu næmingar í framhaldsdeildini í Klaksvíkar skúla út næmingablaðið »Roðin". Jóannes var eitt skifti blaðstjóri. Ein av fyrstu blaðstjórunum á Roðanum var Finnbogi Ísakson. Nevnast kann, at saman við Finnboga Ísaksyni skrivaði Jóannes triðja bindið av 'Løgtingið 150 ár'.

Blaðskrivingin á Roðanum hevur helst givið íblástur, tí Jóannes fór seinni at skriva í Norðlýsinum. Í dag tykist Sosialurin at njóta gott av hesi sveinaroyndini í blaðskriving úr Klaksvík.

Samfelagsviðurskifti og ítróttur áttu stóran áhuga hjá Jóannes, og hann royndi seg eisini í ítrótti. Í 1968 og 1969 var hann talvmeistari í dreingjabólkinum hjá Klaksvíkar Talvfelag. Hann var við til at vinna FM í hondbólti í dreingjadeildini fyri Stjørnuna í 1970 og FM í fótbólti í unglingadeildini fyri KÍ í 1973. Í 1974-76 leikti hann stundum á 1. liði hjá KÍ.

Umframt ítrótt hevur Jóannes havt stóran áhuga í politikki. Men her kenna vit hann best sum eygleiðara og viðmerkjara »uttanfyri vøllin«. Valkvøldini er hann fastur gestur hjá SVF, og fáur hevur so gott innlit í politisk viðurskifti sum Jóannes. Ofta fregnast fólk um hvønn politiskan lit Jóannes hevur, men trupult er at lodda dýpið. Vit sum minnast aftur á yngri dagar vita, at Jóannes hevði avgjørdar »litaðar« politiskar meiningar, men tað vildi verið ein beistagerð móti vinmanninum at avdúka hetta á fimmti ára degnum.

Jóannes var limur í grundlógarnevndini, og er nú limur í stjórnarskipanarnevndini. Jóannes sat í bygdarráðnum í Nes kommunu 1993-2000. Seinna skeiðið sum næstformaður.

Árini í Keypmannahavn var Jóannes virkin í kristiligum arbeiði í Kristnastovu á Amager, eins og hann er tað í samkomuni Nebo á Toftum.

Jóannes giftist í 1978 við Sannu í Túni av Toftum. Tey búsettust á Toftum, tá tey fluttu aftur til Føroya í 1987. Saman eiga tey døturnar Randi og Elisabeth. Randi er gift Símun J. Hansen, og tey eiga dóttrina Sannu.

s.r.

# Judith Nielsen farin

## 8. november 1924 - 17. august 2005



Mikukvøldið andaðist Judith Lilholm Nielsen, Keypmannahavn, 80 ára gomul. Hóast Judith hevur verið á røktarheimi seinastu árini, tí minnið var farið at bila, so hevur hon havt tað gott kropsliga, til hon miku-morginin gjørdist álvarsliga sjúk og varð innløgd á Bispebjerg Hospital.

Judith Hansen, sum var upprunanavn hennara, vaks upp í Havn í heiminum hjá Edvard og Biritu Lindenskov, har hon var tann elsta í barnaflokkinum. Hon var ein av døtrunum hjá Annu og Tummas í Leynum, tey, sum settu búgv í Múlheiðum. Anna, dóttur Elsu og Jens á Trøðni – og Tummas var sonur Annu og Mikkjal, bóndafólkini á Uppistovugarðinum í Leynum.

Barnaflokkurin í Múlheiðum taldi 15, og tey komu øll væl undan. Í 1944 mistu tey pápan. Tummas sló út av trolaranum »Skálaberg« á fiskiveiðu. Í 1952 doyði Anna.

Judith var fjórða í røðini av systkinaflokkinum í Múlheiðum. Hon var niggju mánaðir gomul, tá hon kom til Havnar í 1925 at vera hjá Biritu og Edvard Lindenskov í Rættará. Tummas í Leynum og Birita vóru systkinabørn.

Barnaárini gekk Judith í skúla hjá Amaliu Joensen, Christines Minde (Bauers hús) í Rættará, síðan í realskúla og eftir lokið prógv beint fyri kríggið í 1939 var at finna sær arbeiði, tí hóast evnini til víðari lestur vóru hildin at vera har, varð einki gjørt við tað, tí hóttandi heimsstríð stóð fyri durum, og tað læsti fyri so mangari ætlan hjá teim ungu.

Judith fór á Telefonstøðina sum boðgenta, m. a. at bera boð niðan á Tele-grafstøðina, álitisstarv var hetta, nú kríggj var, og alt sum bar á brá av militeri var undir strongum eftirliti. Síðan hjá Kaaber, tannlækna og fer so á sakføraravirkið hjá Husted Andersen, landsrættarsakførara. Her var hon øll árini, til Husted Andersen flutti av landinum í 1950, men Judith helt fram í sakføraravirkinum, sum nú gekk undir navninum Per Kehler og Leivur Lützen, landsrættarsakførarar.

Judith var eisini skrivari hjá próstinum, reinskrivaði tekstir til føroysku sálmabókina og bókina Víkingasynir.

Í 1953 fluttu Judith og Henning Lilhom Nielsen av landinum, tey giftust í 1949. Hann kom til Føroya sum slaktarameistari í Smæruni í 1947. Henning stovnaði slaktarabúð í Keypmannahavn – og slaktarin á Jydeholmen í Vanløse hevur framvegis gott navn á sær. Nú rekur sonurin Bent handilin, har 10 fólk starvast.

Henning doyði í apríl 1993, 70 ára gamal, sjálv var hon tá givin á sakføraravirkinum Oppenheim & Prangen, men longu tá var farið at bila við heilsuni, og Judith hevur seinnu árini búð á røktarheimi í Brøndshøj.

Judith var livandi og virkin, nærløgd, hon gloymdi ongan, hevði gott samband við øll síni, og eingin serligur dagur fór framvið, at hon ikki mintist.

Hóast minninum hevur bilað, so kundu skyldfólk og kenningar fegnast við blíða bros hennara, tá vitjað var á røktarheiminum í Bystævneparken í Brøndshøj, tí tað bar boð um, at hon kendi, hóast hon ikki fekk sagt stórt meir enn einstøk orð, so váttaði brosið, at hon fataði og nam.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Bjarna Magnussen**, ættaður av Tvøroyri búsitandi í Tórshavn, fer úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 20. august klokkan 13.00.

Kistan við **(Jonn) John Nielsen,** Hvalba fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið 19. august klokkan 19 í Missiónshúsið í Hvalba. Jarðarferðin verður leygardagin 20. august klokkan 13:30.

Tey, ið vilja minnast Jonn kunnu lata Missiónshúsinum í Hvalba eina peningagávu. Konto í peninga-stovnunum.

**Maja Dalsgarð** av Argjum fer til gravar úr Argja Kirkju leygardagin 20. august klokkan 14.00.

Tey, ið ynskja at minnast Maju, kunna lata eina gávu til Argja kirkju ella Oasuna í Hoyvík á konto í peningastovnunum.

*Kelda: Útvarpið*

## Prógv

Lív Hovgaard, Tvøroyri, hevur á DTU lokið prógv sum civilverkfrøðingur í evnafrøði tann 8. august.

Sosialurin
www.sosialurin.fo